RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Ársfrágreiðing 2023

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur ..... 3

2. Árið ..... 4

2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð ..... 4

2.2 Sølan av rúsdrekka er støðug ..... 4

2.3 Vaksandi tollfrí søla ..... 5

2.4 Avlopskrav til avgjald ..... 5

2.5 Sølubúðir og tænasta ..... 5

2.6 Starvsfólkakostnaður ..... 6

2.7 Árið samanumtikið ..... 6

3. Búskapur ..... 7

3.1 Umsetningur ..... 7

3.2 Sølugongdin gjøgnum árið ..... 7

3.3 Rakstraravlopskravið ..... 7

4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl ..... 9

4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir ..... 9

4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar ..... 10

4.3 Vøruúrval býtt í vørubólkar ..... 12

5. Ársroknskapur fyri 2023 ..... 13

5.1 Rakstrarroknskapur ..... 14

5.2 Fíggjarstøða ..... 14

5.3 Notur ..... 15

# 1. Inngangur

Rúsdrekkasøla Landsins er stovnur undir Føroya landsstýri. Rúsdrekkasølan virkar sambært løgtingslóg nr. 111 frá 20. oktober 2023 við ásetingum í kunngerð nr. 130 frá 1. desember 2023.

Rúsdrekkasølan hevur til endamáls at innflyta og selja rúsdrekka. Rúsdrekkasølan hevur einkarætt til innflutning av rúsdrekka og við ávísum avmarkingum og undantøkum eisini einkarætt til sølu av rúsdrekka. Stovnurin skal í so stóran mun sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið.

Rúsdrekkasølan hevur átta handlar kring landið. Teir liggja í: Tórshavn, Klaksvík, Saltangará, Miðvági, Sandi, Trongisvági, Vestmanna og við Norðskála. Handlarnir virka eisini sum fløskumóttøkur.

Harumframt er goymsla á Hjalla og fyrisitingin húsast í Tórshavn. Øll hølini eru leigumál.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur 34 fólk í føstum starvi. Harafturat eru umleið 30 fólk í tímaløntum starvi.

Í hesi ársfrágreiðing verður tikið samanum árið 2023. Komið verður inn á gongdina í søluni, fíggjarlig viðurskifti og annað, sum hevur merkt árið og raksturin í 2023.

Tórshavn, tann 8. oktober 2024

Jan Arabo

virkandi stjóri

# 2. Árið

## 2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð

Síðan einkarsølan Rúsdrekkasøla Landsins (RSL) varð sett á stovn, er ein miðvís broyting í drekkimynstrinum í Føroyum farin fram. Frá í mestan mun at drekka spirtus er drekkimynstrið støðugt broytt til, at tað fyri tað fyrsta verður drukkið minni pr. íbúgva 15 ár og eldri. Ístaðin verður keypt minni av spiritusi og meira vín og øl, sum hevur lægri alkohol styrki. Hetta er at fegnast um, tí tað var júst hetta, sum upprunaliga var málsetningurin við rúsdrekkalógini og einkarsøluni.

Staðfestast kann, at einkarsølan hevur virkað væl sum alkohol politiskt stýringsamboð hjá landinum.

Broytingin í drekkimynstrinum hevur tó við sær minni inntøku hjá RSL – Og skyldast hetta avgjalds og príspolitikkin. RSL hevur tó áhaldandi arbeitt við at tillaga raksturin til hesar broytingarnar í alkoholnýtsluni. Rakstrarkostnaðurin er eisini øktur nakað grundað á lønarhækkingar og aðrar príshækkingar í samfelagnum.

## 2.2 Sølan av rúsdrekka er støðug

Seinasta uppgerðin vísir at sølan av rúsdrekka er støðug og fylgir í stóran mun fólkatalinum. Handlarnir hjá Rúsdrekkasøluni selja áleið tað sama ár um ár. Føroyingar hava tó flutt seg til at keypa meira veikan løg enn teir gjørdu fyrr. Serliga sølan av spiritusi er minkað.

Av øllum vørusløgum vórðu seldir 192.656 litrar innanlands av reinum alkoholi í 2023. Hetta er 9231 litrar minni enn undanfarna ár. Í 2022 vórðu seldir tilsamans 201.874 litrar innanlands av reinum alkoholi.

Tølini vísa, at meira verður selt av víni, meðan minni verður selt av spiritusi. Í 2013 vórðu seldir 52.637 litrar innanlands av reinum alkoholi í víni. Í 2023 var talið 55.454 litrar av reinum alkoholi.

Í 2013 vórðu seldir 70.140 litrar innanlands av reinum alkoholi í spiritusi og í 2023 var talið 68.473 litrar. Hetta svarar til ein vøkstur á 2,38%, samstundis sum fólkatalið í Føroyum í sama tíðarskeiði er vaksið við áleið 6381 fólkum svarandi til 13,28%.

Sølan av øli hevur at kalla óbroytt í mong ár, men hetta er broytt seinastu árini. Í 2013 vórðu seldir

52.008 litrar innanlands av reinum alkoholi í øli. Í 2023 vórðu 62.403 litrar av reinum alkoholi í øli seldir.

Endamálið við Rúsdrekkasøluni var m.a., at hon skuldi virka fyri at tálma nýtsluni. Nýtslan í 1992 var 8,8 litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri. Í 2023 var hon 6,2 litrar.

Í hesum tølum sæst, at rúsdrekkavanarnir eru nógv broyttir síðan Rúsdrekkasølan varð sett á stovn. Nógv meira veikt verður keypt enn sterkt, og fleiri njóta heldur enn bara at rúsa seg.

### 2.3 Vaksandi tollfrí søla

Tollfría sølan er vaksin nógv tey seinastu 10 árini. Sølan av tollfríum reinum alkoholi er vaksin við 13.911 alkohollitrum úr 14.903 alkoholitrar í 2013 til 28.814 alkohollitrar í 2023. Hetta svarar til ein vøsktur uppá 93%. Til samanberingar er innlendissølan uttan tað tollfría vaksin við 75% í hesum skeiðnum.

Tollfría sølan av reinum alkoholi í spiritusi vaks úr 11.178 litrum í 2013 upp í 18.263 litrar í 2023. Sølan av reinum alkoholi í víni vaks úr 3.407 litrar av reinum alkoholi í 2013 upp í 9.421litrar av reinum alkoholi í 2023.

At munandi vøkstur er í tollfríari sølu, nýtist tó ikki at merkja, at nýtslan er vaksandi. Talan kann vera um, at nógv tollfrí søla, sum fyrr var í avgreidd í Kastrup og øðrum floghavnum uttanlands, nú í staðin verður avgreidd á flogvøllinum í Vágum.

### 2.4 Avlopskrav til avgjald

Stovninum er í 2023 álagt at veita landinum 18,600 mió. kr. í avlopi. Hetta er tað sama sum í 2022. Endaliga avlopi fyri 2023 er 19,271 mio. kr.

Avlopskravið er fastsett hvørt ár, sama um nýtslan veksur ella minkar. Eitt avlopskrav hevur verið álagt stovninum, síðan hann fór at virka í 1992. Málið við hesum var, at avlopið lutvíst skuldi nýtast at fíggja upplýsandi virksemi um skaðarnar av rúsdrekka og til at viðgera rúsdrekkamisnýtslu.

### 2.5 Sølubúðir og tænasta

Arbeitt hevur eisini verið við at menna landsfyritøkuna – Ynski er, at hon verður á jøvnum føti við fremstu rúsdrekkasølur í norðurlondum og tí er umráðandi, at dentur áhaldandi verður lagdur á at uppfylla tann eftirspurning, sum viðskiftafólk okkara eftirspyrja og

ynskja. Arbeitt verður tí javnt og miðvíst við at laga seg til tær broytingar, ið eftirspurningur og viðskiftafólk ynskja.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur 8 sølustøð kring landið. Rúsdrekkasølan hevur leingi havt ynski um, at uppstiga tænastustøðið og virksemi sítt í høvuðsstanum: Tórshavn/Hoyvík, so vit kunnu veita eina betur tænastu til økta fólkatalið í økinum.

## 2.6 Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaðurin hækkaði í tíðarskeiðnum 2013-2023 til index 150. Starvsfólkakostnaður umboðar størsta part av rakstrarkostnaðinum í rakstrarroknskapinum, og svaraði hann í 2023 til 12% av umsetninginum.

## 2.7 Árið samanumtikið

Samanumtikið metir leiðslan, at árið er nøktandi, men neyðugt er áhaldandi at tillaga raksturin fyri at ganga øktu útreiðslunum á møti. Eisini er broytta keypsmynstrið við lægri inntøku sum fylgju ein áhaldandi avbjóðing, tá avlopskravið verið hildið fyri eyga.

# 3. Búskapur

## 3.1 Umsetningur

Seinastu árini hevur umsetningurin hjá Rúsdrekkasøluni ligið millum uml. 118 og 159 mió. kr.

Umsetningurin í 2021 er hin størsti, síðan Rúsdrekkasølan varð sett á stovn. Á talvuni niðanfyri sæst, at umsetningurin er væl hægri enn hini árini.  Sølan í 2022 var 3,2 mió lægri enn í 2020, men góðar 10,8 mió hægri enn í 2020. Orsøkin til hesa hækking stavar í stóran mun frá fólkatilflyting umframt, at samfelagsbúskapurin er sera góður.

Umsetningurin fyri seinastu árini sær soleiðis út:

| **Ár** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Umsetningur t.kr.** | **151.668** | **156.556** | **159.792** | **145.745** | **141.513** |

*Talva 3.1: Árligi umsetningurin, 2019-2023*

## 3.2 Sølugongdin gjøgnum árið

Mánaðarliga sølan er rættiliga skiftandi gjøgnum árið. Gongdin í mánaðarligu søluni í 2023 býtir seg áleið eins og árið fyri. Minsta sølan er vanliga í byrjanini av árinum, meðan summarsølan og sølan fram ímóti ársskiftinum vanliga er størri.




| | Jan | Feb | Mar | Apr | Mai | Jun | Jul | Aug | Sep | Okt | Nov | Des |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2019 | 7.326 | 8.634 | 10.339 | 10.727 | 12.775 | 12.931 | 15.853 | 12.425 | 9.527 | 11.180 | 11.936 | 17.860 |
| 2020 | 8.468 | 9.840 | 9.775 | 9.564 | 12.479 | 12.964 | 17.967 | 9.860 | 10.481 | 11.898 | 12.363 | 20.086 |
| 2021 | 8.535 | 11.331 | 14.240 | 11.024 | 13.389 | 13.416 | 19.080 | 11.823 | 11.967 | 12.342 | 11.928 | 20.717 |
| 2022 | 7.653 | 10.323 | 11.336 | 13.443 | 14.159 | 14.293 | 17.605 | 12.493 | 11.147 | 12.050 | 12.229 | 19.825 |
| 2023 | 8.141 | 9.856 | 11.299 | 11.525 | 13.639 | 15.025 | 16.492 | 11.993 | 10.893 | 10.885 | 12.363 | 19.556 |

*Talva 3.2: Umsetningurin fyri hvønn mánað, 2019-2023*

## 3.3 Rakstraravlopskravið

Kravið til avlop av rakstrinum varð í 2010 hækkað við 42% úr 11,8 mió. til 16,8mió. Avlopskravið varð í 2018 lækkað við 800 tkr. ið vórðu latnar sum avsláttur til loyvishavarar og sostatt ikki høvdu nakað fíggjarligt árin á Rúsdrekkasøluna.

Rakstraravlopskravið varð í 2022 økt við 16% ella 2,6 mió. frá 16,0 mió. til 18,6 mió. Í 2023 var avlopskravið eisini 18,6 mo. Kr.

Vit hava í 2022 og 2023 haft afturgongd í umsetninginum í mun til undanfarin ár. Tað er ringt at siga hvat hetta skyldast. Tað kann verða, at meira verður keypt tollfrítt, meira kann verða keypt frá bryggjaríum ella at fólk prioritera á annan hátt nú enn áður.

Í 2022 minkaði umsetningurin við 3,2 mió. í mun til 2021. Eisini í 2023 minkaði umsetningurin í mun til undanfarna ár. Umsetningurin minkaði við 4,9 mió. kr. Í mun til 2022. Hóast hetta eydnaðist tað at røkka avlopskravinum, sum varð ásett í løgtingsins fíggjarlóg fyri 2023.

Kravið var kr. 18.600.000 aftaná rakstrarútreiðslur og útreiðslur til høli, starvsfólk og umsiting. Tá árið varð gjørt upp, gjørdist avlopið kr. 19.271.185, tvs. ein munur uppá 671.1285 kr.

# 4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl

Hesin parturin viðgerð hagtøl og vísutøl fyri søluna í 2019-2023 Eisini verða viðmerkingar gjørdar til einstøku talvurnar.

## 4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir




| | Tórshavn | Klaksvík | Drelnes | Miðvágur | Sandur | Saltangará | Noðrskála | Vestmanna | Ordrar o.a. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2019 | 52.927.89 | 14.142.73 | 9.168.476 | 7.155.488 | 2.949.867 | 13.527.08 | 7.452.214 | 2.012.192 | 32.176.83 |
| 2020 | 62.218.90 | 15.035.76 | 10.615.89 | 7.906.478 | 3.373.549 | 14.555.73 | 8.860.591 | 2.340.073 | 20.838.01 |
| 2021 | 64.320.02 | 15.735.57 | 11.581.39 | 8.269.015 | 3.461.609 | 15.370.26 | 7.724.985 | 2.348.920 | 30.980.61 |
| 2022 | 58.478.33 | 15.258.20 | 10.848.64 | 7.926.914 | 3.311.214 | 14.893.88 | 7.373.331 | 2.182.710 | 36.282.81 |
| 2023 | 56.618.91 | 14.703.66 | 10.250.06 | 7.503.212 | 3.314.993 | 14.773.16 | 7.207.987 | 2.149.116 | 35.146.56 |

*Talva 4.1: Umsetningur, 2019-2023*

Talvu 4.1 omanfyri vísir, at umsetningurin hevur verið rættiliga javnur gjøgnum árini. Útvið helmingurin av umsetninginum í sølubúðum stavar frá deildini í Tórshavn. Allar deildir uttan á Sandi hava selt minni í kr. enn undanfarna ár. Á Sandi hava tey selt nærum tað sama sum í 2022.




| | Tórshavn | Klaksvík | Drelnes | Miðvágur | Sandur | Saltangará | Noðrskála | Vestmanna | Ordrar o.a. | Fyri allar handlar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2019 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 2020 | 118 | 106 | 116 | 110 | 114 | 108 | 119 | 116 | 65 | 103 |
| 2021 | 122 | 111 | 126 | 116 | 117 | 114 | 104 | 117 | 96 | 113 |
| 2022 | 110 | 108 | 118 | 111 | 112 | 110 | 99 | 108 | 113 | 111 |
| 2023 | 107 | 104 | 112 | 105 | 112 | 109 | 97 | 107 | 109 | 107 |

*Talva 4.2: Umsetningur, vísutøl 2019-2023*

Í talvu 4.2 eru vísitølini sett til 100 í 2019 og í 2023 er samlaða vísitalið 107 fyri allar handlar.

Tað er stórur vøkstur í deildunum í Trongsivági og á Sandi. Nakað minni vøkstur er á øðrum deildum. Vøksturin í Klaksvík, Norðskála og Miðvági eru nakað undir miðal.

### 4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.3 er sølan gjørd upp í litrum og býtt í vørubólkar. Eisini er sølan deild upp í innanlands sølu og tollfríari sølu. Nógv størsti parturin av søluni í litrum er øl. Síðani kemur vørubólkurin vín/cider og spiritus. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur.

| Litrar/ár | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **326.563** | **344.430** | **313.871** | **270.433** | **292.904** |
| Innanlands søla | 277.138 | 285.716 | 266.816 | 233.309 | 221.779 |
| Tollfrí søla | 49.425 | 58.714 | 47.055 | 37.125 | 71.125 |
| **Vín/cider** | **626.487** | **650.427** | **673.102** | **651.480** | **640.393** |
| Innanlands søla | 551.518 | 568.506 | 617.909 | 607.191 | 553.228 |
| Tollfrí søla | 74.969 | 81.921 | 55.193 | 44.289 | 87.165 |
| **Heitvín** | **8.485** | **9.066** | **9.515** | **8.692** | **10.823** |
| Innanlands søla | 6.515 | 6.951 | 7.796 | 7.240 | 8.293 |
| Tollfrí søla | 1.971 | 2.114 | 1.719 | 1.452 | 2.531 |
| **Øl** | **1.147.206** | **1.213.108** | **1.281.357** | **1.249.200** | **1.181.930** |
| Innanlands søla | 1.131.979 | 1.196.032 | 1.261.405 | 1.229.918 | 1.159.816 |
| Tollfrí søla | 15.227 | 17.075 | 19.952 | 19.282 | 22.114 |
| **Alkholfrítt** | **5.714** | **6.055** | **6.568** | **5.937** | **5.752** |
| Innanlands søla | 5.644 | 6.055 | 6.568 | 5.897 | 5.749 |
| Tollfrí søla | 69 | - | - | 40 | 3 |
| **Íalt** | **2.114.454** | **2.223.086** | **2.284.412** | **2.185.742** | **2.131.803** |
| Innanlands søla | 1.972.793 | 2.063.261 | 2.160.493 | 2.083.554 | 1.948.865 |
| Tollfrí søla | 141.661 | 159.825 | 123.919 | 102.188 | 182.938 |

*Talva 4.3: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, 2019-2023*

| Vísital/ár | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **111** | **118** | **107** | **92** | **100** |
| Innanlands søla | 125 | 129 | 120 | 105 | 100 |
| Tollfrí søla | 69 | 83 | 66 | 52 | 100 |
| **Vín/cider** | **98** | **102** | **105** | **102** | **100** |
| Innanlands søla | 100 | 103 | 112 | 110 | 100 |
| Tollfrí søla | 86 | 94 | 63 | 51 | 100 |
| **Heitvín** | **78** | **84** | **88** | **80** | **100** |
| Innanlands søla | 79 | 84 | 94 | 87 | 100 |
| Tollfrí søla | 78 | 84 | 68 | 57 | 100 |
| **Øl** | **97** | **103** | **108** | **106** | **100** |
| Innanlands søla | 98 | 103 | 109 | 106 | 100 |
| Tollfrí søla | 69 | 77 | 90 | 87 | 100 |
| **Alkholfrítt** | **99** | **105** | **114** | **103** | **100** |
| Innanlands søla | 98 | 105 | 114 | 103 | 100 |
| Tollfrí søla | 2.527 | - | - | 1.440 | 100 |
| **Íalt** | **99** | **104** | **107** | **103** | **100** |
| Innanlands søla | 101 | 106 | 111 | 107 | 100 |
| Tollfrí søla | 77 | 87 | 68 | 56 | 100 |

*Talva 4.4: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, vísutøl 2019-2023*

Talva 4.4 vísir gongdina í litrum/vørubólkum, sum indekserað tøl. Størsta afturgongdin sæst í tíðarskeiðnum 2019-2023 í vørubólkunum heitvín, meðan størsta framgongdin í sama tíðarskeiði sæst í vørubólkinum spiritus.

### 4.3 Vøruúrval býtt í vørubólkar

Talva 4.7 niðanfyri vísir vøruúrvalið býtt í vørubólkar fyri tíðarskeiðið 2013-2022. Skilt millum tal á vørum seldar innanlands og vørur seldar tollfrítt, umframt at samlaða vøruúrvalið er víst.

| Úrval/ár | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **1.267** | **1.320** | **1.429** | **1.209** | **1.284** |
| Innanlands | 805 | 864 | 956 | 709 | 747 |
| Tollfrí søla | 462 | 456 | 473 | 500 | 537 |
| **Vín/cider** | **1.962** | **1.979** | **1.918** | **1.756** | **1.708** |
| Innanlands | 1.703 | 1.734 | 1.665 | 1.468 | 1.428 |
| Tollfrí søla | 259 | 245 | 253 | 288 | 280 |
| **Heitvín** | **123** | **103** | **120** | **103** | **130** |
| Innanlands | 100 | 79 | 92 | 76 | 102 |
| Tollfrí søla | 23 | 24 | 28 | 27 | 28 |
| **Øl** | **747** | **844** | **892** | **733** | **712** |
| Innanlands | 701 | 799 | 833 | 680 | 665 |
| Tollfrí søla | 46 | 45 | 59 | 53 | 47 |
| **Alkholfrítt** | **49** | **73** | **82** | **73** | **71** |
| Innanlands | 49 | 73 | 82 | 73 | 71 |
| Tollfrí søla | | | | | |
| **Íalt** | **4.148** | **4.319** | **4.441** | **3.874** | **3.905** |
| Innanlands | 3.358 | 3.549 | 3.628 | 3.006 | 3.013 |
| Tollfrí søla | 790 | 770 | 813 | 868 | 892 |

*Talva 4.7: Vøruúrval býtt í vørubólkar, 2019-2023*

Nógv størsta vøruúrvalið er í vørubólkinum vín/cider. Síðani koma vørubólkarnir spiritus og øl. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur. Samanumtikið seldi Rúsdrekkasølan 4.148 ymisk sløg av løgi í 2023 í mun til 4.319 sløg av løgi í 2022.

Vøruúrvalið og tænasta verða áhaldandi ment í mun til tað, ið rørir seg uttanlands umframt í trá við tað viðskiftafólk í Føroyum eftirspyrja. Hetta krevur nakað av starvsfólkum okkara, sum fegin arbeiða áhaldandi við at menna vøruúrvalið og kundatænastuna til frama fyri føroyingin og viðskiftafólk okkara sum heild.

# 5. Ársroknskapur fyri 2023

Niðanfyri er ársroknskapurin hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri 2023 settur upp í mun til árið 2022. Roknskapurin fevnir um rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notur.

## 5.1 Rakstrarroknskapur

| | Nota | **Ár 2023** | **Ár 2022** |
|---|---|---|---|
| Inntøkur: | | | |
| Vørusøla | | 151.667.673 | 156.556.044 |
| Vørunýtsla | | -107.225.047 | -111.972.914 |
| Skiftisavlop | | 44.442.626 | 44.583.130 |
| | | | |
| Útreiðslur: | | | |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -17.982.058 | -17.031.500 |
| Avskrivingar | 4 | | -1.690.506 |
| Annar kostnaður | 2 | -7.148.245 | -7.451.337 |
| Útreiðslur tils.: | | -25.130.303 | -26.173.344 |
| | | | |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | | 19.312.324 | 18.409.786 |
| | | | |
| Fíggjarpostar | 3 | 28.079 | 46.796 |
| | | | |
| Roknskaparligt avlop | | 19.340.402 | 18.456.582 |

***Avrokning av avlopi, ásett á fíggjarlógini***

| | | | |
|---|---|---|---|
| Roknskaparligt avlop | | 19.340.402 | 18.456.582 |
| Avskrivingar | | | 1.690.506 |
| Íløgur | | -69.218 | -230.467 |
| Nettoavlop | | 19.271.185 | 19.916.621 |
| Avlop, ásett á fíggjarlógini | | 18.600.000 | 18.600.000 |
| Munur | | 671.185 | 1.316.621 |

## 5.2 **Fíggjarstøða**

| | Nota | **31.12.2023** | **31.12.2022** |
|---|---|---|---|
| **OGN:** | | | |
| Støðisogn | 4 | 1.836.113 | 1.766.896 |
| Vørugoymsla | | 13.365.769 | 14.052.884 |
| Vøru- og tænastuáogn | | 609.076 | 585.004 |
| Tíðaravmarkingar | | 2.405.095 | 6.259.488 |
| Tøkur peningur | | 6.223.374 | 4.999.486 |
| OGN, tilsamans | | 24.439.427 | 27.663.756 |
| | | | |
| **SKULD:** | | | |
| Eginogn | 5 | 1.836.113 | 1.766.896 |
| Vøru- og tænastuskuld | 6 | 1.747.594 | 1.885.738 |
| Millumrokning við Gjaldstovuna | 7 | 13.674.715 | 17.204.736 |
| Tíðaravmarkingar | | 5.767.264 | 5.326.330 |
| Meirvirðisgjald | | 1.413.740 | 1.480.057 |
| | | 22.603.313 | 25.896.861 |
| Eginogn og skuld tilsamans | | 24.439.427 | 27.663.756 |
| | | | |
| Leasingskyldur | | - | - |
| Leiguskyldur pr. ár pr. 31.12. | | 8.027.570 | 8.645.400 |

## 5.3 Notur

| NOTUR 1-3: | Ár 2023 | Ár 2022 |
|---|---|---|
| **Nota 1, Starvsfólkakostnaður:** | | |
| Lønir | -14.546.086 | -13.886.754 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | -724.822 | -696.227 |
| Eftirlønir | -1.974.580 | -1.837.968 |
| Burðarfarloyvi | 45.733 | 210.641 |
| Annar starvsfólkakostnaður | -856.988 | -821.191 |
| Endurgoldið løn | 74.685 | - |
| **Starvsfólkakostnaður tilsamans** | **-17.982.058** | **-17.031.500** |
| | | |
| **Nota 2, Annar rakstrarkostnaður:** | | |
| Høliskostnaðir | -4.285.907 | -4.212.914 |
| Fyrisitingar kostnaðir | -2.396.787 | -2.927.253 |
| Logistikkkostnaðir | -263.581 | -254.340 |
| Sølukostnaðir | -130.087 | -68.722 |
| Flutningsútbúðanur | -119.993 | -156.837 |
| Útr. viðv. undanfarin ár | 48.109 | 174.200 |
| Óvanligar útreiðslur | - | -5.471 |
| **Annar kostnaður tilsamans** | **-7.148.245** | **-7.451.337** |
| | | |
| **Nota 3, Fíggjarpostar:** | | |
| Gjaldoyra vinningur/tap | 28.079 | 46.796 |
| **Fíggjarpostar tilsamans** | **28.079** | **46.796** |

| **NOTUR 4-7:** | **Ár 2023** | **Ár 2022** |
|---|---|---|
| **Nota 4, Avskrivingar/støðisogn:** | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 49.869.530 | 49.639.063 |
| Tilgongd | 69.218 | 230.467 |
| Útveganarvirði við ársenda | 49.938.748 | 49.869.530 |
| *Avskrivingar:* | | |
| - við ársbyrjan | -48.102.635 | -46.412.128 |
| - í árinum | | -1.690.506 |
| Avskrivingar við ársenda | -48.102.635 | -48.102.635 |
| **Bókað virði við ársenda** | **1.836.113** | **1.766.896** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 5, Eginogn:** | | |
| Saldo við ársbyrjan | 1.766.896 | 3.226.935 |
| Roknskaparligt avlop | 19.340.402 | 18.456.582 |
| Nettoavlop, at avroknað | -19.271.185 | -19.916.621 |
| **Eginogn við ársenda** | **1.836.113** | **1.766.896** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 6, Vøru- og tænastuskuld:** | | |
| Vøruskuld | 889.227 | 819.118 |
| Tænastuskuld | 723.598 | 597.013 |
| Tollkredittur | 134.770 | 469.607 |
| **Vøru- og tænastuskuld tilsamans** | **1.747.594** | **1.885.738** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 7, Millumrokning við Gjaldstovuna:** | | |
| Saldo við ársbyrjan | 17.204.736 | 10.981.275 |
| Nettoavlop, at avrokna | 19.271.185 | 19.916.621 |
| Løngjaldstovan | 17.198.794 | 16.306.841 |
| Goldið í árinum | -40.000.000 | -30.000.000 |
| **Millumrokning við ársenda** | **13.674.715** | **17.204.736** |